# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Smyril Line á rættkjøl

Tað vóru kærkomin tíðindi, sum Útvarpið hevði at bera Føroya fólki í gjár. At tað nú gongur betri hjá fyritøkuni, og at ferðafólkatalið í ár er vaksið við einum triðingi sammett við í fjør.

Nú kann ein spyrja, hví vit fegnast um, at tað gongur væl ella betri hjá eini einstakari fyritøku. Orsøkin er tann einfalda, at Smyril Line er okkara einasta sjóvegis ferðasamband við umheimin, og at hetta felag av mongum verður mett sum okkara nationala reiðarí – ja lokomotivið, tá tað umræður at menna eina føroyska ferðavinnu. Tí uttan Norrønu hevði verið soltið hjá teimum, sum reka ferðavinnu her á landi. Smyril Line er at meta sum ein brúgvabyggjari millum Føroyar og umheimin og sum føðir alt tað stóra ferðamannabaklandið her heima. Sjálvandi ber eisini til at ferðast til Føroya við flogfari , men tað í sær sjálvum er ikki nóg mikið, og tað nøktar so ikki allan tørvin.

Tað er eingin loyna, at tað hevur gingið trupult hjá Smyril Line nú í mong ár, serstakliga síðani, at Norrøna rendi á land. Men eisini í aðrar mátar hevur gingið skeiva vegin. Tað, sum varð mett at vera ein bjarging fyri felagið, nevniliga, at hetlendingar settu pengar í, skuldi vísa seg eisini at hava eina slagsíðu. Rutan til Hetlands gav ikki nokk.

Manglandi inntøkurnar hava so gjørt, at umframt hetlendingar hava eisini fyritøkur og grunnar í Føroyum sæð seg noyddar at seta uppaftur fleiri pengar í fyritøkuna, nú somu longu høvdu sett í frammanundan. Heldur enn at missa sínar pengar og standa og hyggja at, meðan henda so týðandi inntøkukelda fyri Føroyar sum ferðamannaland fór niður við flagginum og glapp okkum av hondum, gjørdu íleggjararnir av at váða enn fleiri pengar. Hetta var eisini gjørt út frá tí stavnhaldi, at Norrøna er so grundleggjandi fyri ferðamannavinnuna sum heild.

Nú síggja vit so tekin til, at íløgurnar hava ikki verið til fánýtis, men tað eru eisini góð og dugnalig fólk hjá fyritøkuni, sum hava megnað at vent gongdini. At víðka um sesongina, at sigla meira uppá Noreg og nú eisini at taka Skotland við í siglingina gerastøðuna betri og somuleiðis framtíðar útlitini. At taka Skotland við er uttan iva sera skilagott, tí tað fer at fáa bæði føroyingar og norðmenn at bíleggja sær ferðaseðlar við Norrønu. Vit kunnu bara ynskja tykkum hjá Smyril Line tillukku og góða eydnu.

**Sosialurin**

# Burtur við Visjón 2015, burtur við oljuavgjaldi, niður við MVG'num

**GERHARD LOGNBERG**
løgtingsmaður



**- Vit eiga ikki at nevna Visjón 2015 við einum orði, oljuavgjaldið skal takast av. MVG á olju skal minkast ella burtur, og vektgjaldið á bilum skal lækkast. Hetta sigur Gerhard Lognberg, løgtingsmaður Javnaðarfloksins m. a.:**

Ja, vit vóru tríggir flokkar sum gjørdu samgongu, og var eg sjálvur spentur, hvussu fór at ganga, og haldi eg at gongdin hevur verði á eini leið.

Í undanfarnu samgongu hoyrdist nógv um fullveldi, tosið var bara um tað, fyri ella ímóti, og vóru fólk troytt av hesum tosi. Prátið kvaldist, tá aðrir bollar komu í suppuna.

Visjón 2015 var koyrd av bakkastokki, og sjálvsagt var eg sum samgongulimur við til at sjóseta hana.

Landsstýrið setti visjónsbólkar, sjálvsagt við tí vón, at teir sovnaðu við visjónina, tí tað er tað teir eru best til.

Men so var ikki, tí nógvar leivdir eru frá undanfarnum samgongum, av skrivstovuveldinum sum manna stratigibólkarnar. Tað er ikki rætt at kalla teir partisanar, men....

So teir siga takk fyri seinast, uttan at bossarnir í samgonguni siga so nógv.

Stratigibólkarnir seta dagsordan. Teir hava visjónstorg. Sita har og fortelja hvørjum øðrum, hvussu man kann best sláa hondina av tí meiniga manninum.

Onkur slær nevan í borið, so masjettknapparnir fúka upp undir armholurnar og sigur, at skatturin skal lækkast 4%. Síðani skal tann meinigi føroyingurin dragast eftir hárinum og skal brandskattast av øllum, helst eisini eidindómsskatt.

Hesum fólkum, sum ikki unna tí meiniga føroyinginum tað svarta undan neglunum.

Hjá teimum misseydnast eingin túrur, sum hjá sjómonnunum og verkafólki, tey fáa kekkin óansæð um tey gera nakað ella onki.

Hví koma tey ikki við forsløgum um at minka sína egnu løn ella eftirlønina hjá sær sjálvum ella hjá løgtingsmonnum, landsstýrismonnum o. s. f. Ella halda hesi fólk, at bara tey eru verd sína løn?

Nei, mínir kæru samgongulimir. Latið okkum fáa hesi fólk til arbeiðis aftur, har tey gera nakað til nyttu, tí føra politikk skulu vit sjálvi gera, tað hevur fólkið valt okkum til - minnist til tað.

Men eg var glaður at hoyra løgmann siga, at tað vóru politikkarar sum skuldu føra politikk. Sjálvur helt eg partamannin ikki verða nóg sannførandi, tí mín góði vinur Jóannes Eidesgaard, tey fólk sum hoyra til arbeiðarastættina eru sjokkeraði av at hoyra hesi fólk innan fyri tað almenna, sum hava eina feita løn, eina feita eftirløn, helst ein bil og eru uttanlands so ofta teimum sýnist.

Eg gleðist um, at landsstýrismaðurin í innlendismálum segði, hvat hann ætlaði.

Nei. Latið okkum sum settu hesa samgongu út í kortið fullføra verkið, so verður tað til gleði fyri borgararnar, og latið okkum ikki nevna visjón 2015 við einum orði aftur, men føra okkara politikk.

Oljuavgjaldið eiga vit at taka av. Mvg á oljuni minkast ella burtur, vektgjaldið á bilum lækkast. Hetta er nakað, sum gagnar borgaranum, teimum sum ikki fáa so feitar lønir.

Eg skal enda greinina við hesari yrkingini hjá M. S Viðstein:

*So føgur skyggir sól í líðir*
*hon fargar hav og gyllir fjøll*
*hon boðar: sigra skal umsíðir*
*hin breiða mannafjøldin øll*
*tá skal reyða frælsissólin branda*
*á tindum og gløða í líð*
*og ljós skal kveikjast vítt um landa*
*tá fylkist fjøldin til sigrandi stríð.*

# Kringvarp Føroya manglaði í 100 ára føðingardagsveitsluni

**NAPOLION MAGNUSSEN**
borgarstjóri, Miðvágur



So upprann tann stóri dagur, at Alma Frederiksen í Miðvági fylti 100 ár. Vit vóru omanfyri 250 fólk sum saman komu til hennara heiður á hesum stóra degi á Ellis og Avlamisheiminum í Miðvági. Ein stórur partur av familjuni, sum býr í útlondunum, var heimkomin til hetta høvi og alt var sera væl fyriskipa á Ellisheiminum av starvsfólkunum og teimum avvarðandi. Nógvar talur vóru hildnar, og sjálvt føðingardagsbarnið helt ein sera, sera góða talu, tað bestu.

Men har manglaði okkurt. Har manglaði Kringvarp Føroya, tí hvørki SVF ella ÚF møttu upp! Og í tíðindasendingunum mánadagin vóru eingi tíðindi um Almu, tað megnarkvinnu, sum mestsum hvønn dag fylgir við í Útvarpi og Sjónvarpi, tí hon er nevniliga so birg enn. Men um Bush og hansara vavgreyt var ovmikið av tíðindum um, tað skuldi verða hansara dagur, eisini her hjá okkum.

Men í Miðvági og í Vágum var tað dagurin hjá Almu, og um tit ikki "uppdagaðu" tað, ja so gerst ikki við. Gud fyrigevi tykkum at tit heldur vilja síggja ræðusøgur enn sólskinssøgur, tær skorta jú ikki í fjølmiðlunum. Og Alma, ja hon fyrigevur tykkum helst eisini.

Gingin eru meira enn áttati ár síðan fólk í Miðvági seinast fylti hundrað, vónandi gongur ikki so long tíð til næstu ferð, vónandi verður okkurt tá í Kringvarpinum at frætta.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.